EB/Streymur-VB:

# Bæði eru frígjørd

**Eingir nervar tyngja liðini, sum fara á vøllin norðuri á Eiði sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hvørki hjá EB/Streymi ella VB er talan um so øgiliga nógv annað enn æruna, sum stendur upp á spæl, tá liðini hittast á Eiði sunnudagin.

Gaman í kann EB/Streymur framvegis enda næst aftast og VB kann vinna bronsu, men hesir møguleikar tykjast dekan av teoretiskir, nú bert tvey umfør eru eftir.


*Í vár vann VB ein tepran sigur á uppflytarunum, og hetta ætla hesir helst at hevna á Eiði*

### Fáar broytingar

Tí kunnu bæði liðini helst fara fullkomuliga frígjørd inn á vøllin, og vónirnar eru sjálvandi, at hetta kann geva úrslit í hampuliga flótandi fótbóltsspæli frá báðum pørtum.

Um liðini er annars at siga, at tey eru í so at siga sterkastu uppstilling. Hjá uppflytarunum er tað bert Ronnie Samuelsen, sum kom til í summarsteðginum, ið er leikbannaður. Hann hevur fingið tvey gul kort, meðan hann hevur spælt við EB/Streymi, men harafturat skal leggjast eitt, sum hann fekk við B36 í fyrru hálvu.

Hjá vágbingum tykist sama fólkið vera tøkt, sum til dystin móti B71 fyri viku síðani. Tað frættist, at kanska onkur dreingjaliðsspælari eisini verður at síggja í hópinum, men í byrjunaruppstillingini verður neyvan talan um tær stóru broytingarnar.

## Dystir umvikuskiftið:

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 23.09 | B68-GÍ | Lassin Isaksen |
| 23.09 | FSV-KÍ | Petur E. Kjærbo |
| 23.09 | B36-HB | Petur Hansen |
| 23.09 | EB/S-VB | Eiler Rasmussen |
| 23.09 | NSÍ-B71 | Birgir Sondum |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 22.09 | Skála-KÍ | Oddmar Andreasen |
| 22.09 | NSÍ-ÍF | Niklas á Líðarenda |
| 22.09 | HB-GÍ | Birgir Sondum |
| 22.09 | LÍF-B36 | Dagfinn Olsen |
| 22.09 | Sumba-TB | Lassin Isaksen |

Allir dystirnir verða leiktir kl. 14.00

**3. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 22.09 | B68-GÍ | Edvard Højgaard |
| 22.09 | ÍF-KÍ | Rúni Gaardbo |
| 22.09 | B36-AB | Páll Augustinussen |
| 22.09 | TB-VB | Poul Erik Jacobsen |
| 22.09 | B71-Royn | Georg Rasmussen |

Allir dystirnir verða leiktir kl. 15.00

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 22.09 | KÍ-HB | Jonhard Hansen |
| 22.09 | VB-B71 | Poul Erik Jacobsen |
| 22.09 | B36-B68 | Eigil Olsen |

FS Vágar-KÍ:

# FSV hongur í klønum tráði

**Stórur møguleiki er fyri, at dysturin í morgin verður tann síðsti í Vágum í fremstu røð í hesum umfarinum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað er púra greitt, at tá FS Vágar og KÍ í morgin fara á vøllin í Miðvági, so verður talan um síðsta 1. deildardystin í Miðvági í fleiri ár. Spurningurin er, um tað yvirhøvur verður talan um 1. deildar fótbólt í Vágum komandi ár. Tað er nógv treytað av úrtøkuni hjá FS Vágum í morgin.

At tað longu nú er greitt, at eingin 1. deildar fótbóltur verður í Miðvági komandi ár kemst av, at avtalan millum feløgini í Vágum sigur, at heimavøllurin skal skifta ímillum tær tríggjar bygdirnar. Í fjør spældi FSV í Sørvági, og komandi ár skulu teir spæla í Sandavági.


*Klaksvíkingar siga seg ongar trupulleikar hava við motivatiónini*

### Lítið mannfall

Í Vágum vóna teir, at teirra lið í morgin skal finna spælið aftur, sum teir sýndu, tá B36 var har vesturi.

Tað er greitt, at Torkil Nielsen ikki verður við. Hann fekk ein løst, tá GÍ var har vesturi og verður ikki við. Hannus Olsen og Ruslan Screlea eru báðir tøkir aftur.

Í Klaksvík iðra teir seg um, at teir ikki megnaðu at vinna ímóti B36. Motivatiónin sigst vera í lagi, og teir stríðast framvegis fyri fjórða plássinum. Síðst var Fríðin Ziskason leikbannaður. Hann er tøkur aftur. Málverjin, Meinhardt Joensen, hevur havt trupulleikar við øðrum fótinum og hevur í vikuni verið eitt sindur burtur frá venjing. Teir rokna kortini við, at hann fer at spæla. Eykamálverjin, Karstin Joensen, hevur brotið ein fingur. Tí var veteranurin John Willian Joensen eykamálverji ímóti B36, og hann verður aftur á beinkinum í Miðvági.

Alexander Djordjevic hevur verið sjúkur í vikuni. Hóskvøldið vandi hann fyrstu ferð í hesi vikuni.

NSÍ-B71:

# NSÍ dámar best uttan trýst

**NSÍ hevuir bert æruna at spæla fyri, men royndirnar siga, at tað plagar at tæna teimum best úrslitaliga**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*


*Á Sandi vunnu Ian Højgaard og teir á B71. Nú skulu sandoyingar hava stig, og teir fara heilt víst at stríðast fyri hesum*

Tað hevur víst seg seinnu árini, at tá runavíkingar einki annað enn æruni hava at spæla fyri, er ikki lukkuligt at vera fyri. Mest sjónligt var hetta í fjør, tá teir lógu illa fyri, men brádliga tóku øll oddaliðini eftir tørni. Eisini hevur GÍ kent sviðan av hesum, tá runavíkingar fyri viku síðani at kalla køvdu gullvónina hjá gøtumonnum.

Hesa ferð er tað tó ikki nakað oddalið, sum kemur á vitjan, men tað tykist vera ein trupul uppgáva, sum sandoyingar hava fyri framman.

Runavíkingar mugu tó vera Djóna N. Joensen fyri uttan til dystihn. Hann hevur meitt sær fótliðið, og í allar besta føri kann talan gerast um eitt pláss á beinkinum fyri hansara viðkomandi.

Hann var tó heldur ikki við í Gøtu, so alt í alt tykist talan gerast um á leið sama liðið.

### Skulu vinna

Hjá sandoyingum eru treytirnar greiðar undan dystinum. Teir kunnu í øllum førum ikki dúva upp á lítla fyrimunin, sum teir hava til vágamenn, og tí skulu stig, og helst trý av slagnum inn á kontina sunnudagin.

Til dystin hevur Kári Reynheim allar sínar mans – undantikið langtíðarskadda Iulian Florescu – tøkar. Hóast hetta sjálvandi eru góð boð, so tykist Kári leggja størri dent á onnur viðurskifti, enn akkurát, hvat fólk er á vøllinum.

- Tað, sum nú ræður um hjá okkum, er at vit fara á vøllin at gera eitt gott arbeiði. Hvør einstakur leikari noyðist at taka ábyrgd og spæla upp til sítt allarbesta hesaferð. Tað hevur verið ov ofta, at ov fáir hava tikið hesa á seg, og serstakliga í seinnu helvt hevur hetta eisini verið at sæð aftur í úrslitunum, sigur Kári, sum við hesum hevur sagt sínum monnum, hvat hann væntar frá teirra síðu, tá farið verður á vøllin við Løkin sunnudagin.

## Tølini tala

*Á talvuni høgrumegin sæst, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg, tá hesi hava dystast í tilsvarandi dystunum seinastu 10 árini*

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B68-GÍ | 3-7 | 2-5 | 0-1 | 1-4 | 0-3 | 1-1 | 0-7 | 0-1 | 1-4 | 2-2 | 0-2-8 | 10-35 |
| FSV-KÍ | 4-5 | - | - | 1-1 | 1-3 | 5-3 | - | - | 1-2 | 1-2 | 1-1-4 | 13-16 |
| B36-HB | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 2-0 | 0-5 | 1-3 | 1-1 | 2-2 | 1-1 | 1-3-6 | 10-20 |
| EB/S-VB | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| NSÍ-B71 | 1-1 | 4-0 | - | 3-1 | - | 0-2 | 0-1 | - | 2-2 | - | 2-2-2 | 10-7 |



B68-GÍ:

# Tólv ár síðani GÍ tapti á Svangaskarði

**Seinastu tólv árini hava gøtumenn skorað 37 mál á Svangaskarði, meðan B68 hevur fingið ellivu**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Hagtøl telja einki, tá spælararnir standa andlit til andlit á vøllinum og eru uppsettir til tvær ferðir trý korter í fótbólti. Soleiðis plagar at verða tikið til, og sjálvandi er tað nakað í hesum. Í einum fótbóltsdysti byrja bæði liðini altíð so at siga á sløttum.

Men tá hetta er sagt, so eigur at verða lagt afturat, at tað er merkisvert, so ofta tað gongur, sum tað plagar at gera.

Eitt gott dømi um hetta eru dystirnir á Svangaskarði ímillum B68 og GÍ. Tá toftamenn í morgin fara á heimavøllin við tí í hyggju at tryggja sær triðja plássið, so vita teir, at tað hevur ikki eydnast teirra liðið at vinna heimadystin ímóti GÍ síðani 1989. Tað árið vann B68 1–0. Málskjútti var verjuspælarin hjá GÍ, Hans Mourits Foldbo. Hann var tá lærari á Toftum og hoyrdi ivaleyst nógv fyri, at hann hevði verið so fittur at gera sjálvmál.


*Skal B68 loksins vinna heimadyst móti GÍ, vóna tey helst, at hesin maðurin fer at gera um seg*

Síðani tá hevur tað tvær ferðir verið javnleikur – 2–2 í 1991 og 1–1 í 1991. Tá B68 var meistari í 1992, taptu teir 4–1 á heimavølli ímóti GÍ. Í tólv ár eru 37 mál farin ígjøgnum hjá B68. Størsti ósigurin var í 1994, tá GÍ í 11. umfarinum, sum var tað fyrsta eftir summarsteðgin sigraði 7–0.

### Ymiskt við fólki

Hjá B68 eru allir spælararnir tøkir í morgin. Eingin spælari er skaddur, og eingir er leikbannaður.

Hjá Johan Nielsen og GÍ er tað eitt sindur meiri ivasamt. Poul Henning Jacobsen, sum var sjúkur, tá GÍ tapti ímóti NSÍ, er tøkur aftur. Jóan Petur Olsen loysti av á miðvøllinum, men hann noyddist heilt skjótt at taka seg aftur. Jóan Petur er ivasamur í morgin. Sámal Joensen, sum hevur verið langtíðar skaddur, hevur vant í vikuni, men enn er ikki greitt um hann byrjar inni ímóti B68.

Hjá GÍ er einki sum eitur. Skulu teir hugsa um gullkrónurnar, so mugu teir gera, sum teir plaga – altso vinna á Toftum – og so mugu teir bíða og vita, um HB fer at hjálpa teimum í Gundadali.

# FCK og Brøndby í góðari støðu

**Avloysarin hjá Toda Jónsson skoraði bæði málini á heimavølli, og Brøndby vann sannførandi á útivølli**

DANMARK
*Jóannes Hansen*

Tað var nógvur fótbóltur á skránni í Europa hóskvøldið. FCK var í eldinum í Parkini, har teir høvdu vitjan av jugoslaviska Obilic. Tað var hetta liðið, sum sendi GÍ úr UEFA kappingini. FCK vann 2–0, og harvið hava teir eina góða útgangsstøðu undan returdystinum, sum verður komandi hóskvøld.

Todi Jónsson var ikki á vøllinum hóskvøldið. Hann er skaddur, og tað er ikki sannlíkt, at hann verður førur fyri at spæla komandi hóskvøld.

Um hann hevði verið tøkur, so er tað ein spurningur, um hann hevði verið valdur ímillum teir fyrstu ellivu. Heine Fernandez fekk møguleikan sum makkari hjá Zuma, nú Todi var skaddur. Og Fernandez takkaði fyri. Eftir Zuma upplegg skoraði hann til 1–0, tá tíggju minuttir vóru farnir, og í 2. hálvleiki økti hann, eftir langa sending frá verjuspælaranum Jacob Laursen.

Brøndby var í Póllandi og spældi ímóti Olimpija Ljublana. Heimaliðið kom á odda beinanvegin, men Brøndby fótaði sær væl og vann 4–2. Tí átti tað komandi hóskvøld at verið talan um avgreiðsluspurning á Brøndby stadion.

Tað gekk minni væl hjá jysku liðunum, sum høvdu betri lið ímóti sær. FCM tapti á heimavølli 3–0 ímóti Sporting Lissabon, og Real Zaragoza sendi Silkeborg til hús við 3–0 tapi.

Í superliguni verður spælt soleiðis í vikuskiftinum: Vejle–AB, Silkeborg–FCM, Lyngby–OB, Brøndby–Viborg, AaB–FCK og Esbjerg–AGF, sum verður spældur mánakvøldið.

Mikukvøldið varð Hvidovre sent úr steypakappingini. Á heimavølli endaði tað málleyst ímóti Køge, bæði í vanligu leiktíðini og í eykatíðini, sum var tvær ferðir fimtan minuttir. Í brotssparkskappingini skoraði Køge seks mál og Hvidovre fimm.

B93 og Randers Freja fara at spæla 3. oktober í fjórða steypaumfarinum.

Í landskappingini skuldi Hvidovre longu fríggjakvøldið spæla á heimavølli ímóti Brønshøj. Sunnudagin spæla B93 og Farum og Horsens og Randers Freja.

Í Noreg hvílir tippuligan seg í vikuskiftinum. Orsøkin er tann, at eitt umfar í steypakappingini er á skránni. Jákup Mikkelsen og Molde eru ikki longur við í steypakappingini.

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 16 | 14 | 1 | 1 | 53 | 13 | 40 | 43 |
| 2 | GÍ | 16 | 12 | 2 | 2 | 48 | 18 | 30 | 38 |
| 3 | B68 | 16 | 9 | 2 | 5 | 35 | 21 | 14 | 29 |
| 4 | VB | 16 | 7 | 3 | 6 | 38 | 22 | 16 | 24 |
| 5 | NSÍ | 16 | 6 | 4 | 6 | 19 | 20 | -1 | 22 |
| 6 | KÍ | 16 | 7 | 0 | 9 | 23 | 36 | -13 | 21 |
| 7 | HB | 16 | 6 | 2 | 8 | 27 | 23 | 4 | 20 |
| 8 | EB/Streymur | 16 | 5 | 1 | 10 | 19 | 29 | -10 | 16 |
| 9 | B71 | 16 | 3 | 1 | 12 | 15 | 46 | -31 | 10 |
| 10 | FS Vágar | 16 | 3 | 0 | 13 | 17 | 66 | -49 | 9 |

# FM vinnararnir verða fagnaðir

**Síðsti dysturin hjá KÍ kvinnunum verður í dag á heimavølli ímóti HB**

GULLROK
*Jóannes Hansen*

KÍ kvinnurnar hava framvegis stórar avbjóðingar í hesum kappingarárinum. Um mánaðarskiftið skulu tær, sum tær fyrstu í føroysku fótbóltssøguni, luttaka í Europa Cup.

Hesa uppgávuna hava tær í Klaksvík fyrireikað seg leingi til, og nú fara tær at sleppa undan at hugsa um heimligu kappingina. Týskvøldið høvdu tær vitjan av B68. KÍ vann 1–0. Málið skoraðu tær seint í 2. hálvleiki. Málskjútti var Kristina Eyðbjørnsdóttir.

Seinnapartin í dag klokkan 15.00 er síðsti landskappingardysturin á skránni. Mótstøðuliðið verður steypavinnararnir úr HB. Tað er longu greitt, at KÍ hevur vunnið meistaraheitið. Tá dysturin í dag verður liðugur, verður FM steypið, sum KÍ eisini í fjør vann, handað teimum.

Vit frætta úr Klaksvík, at tað verður ikki gjørt sørt burturúr, nú kvinnuliðið skal fagnast. Í KÍ verður vónað, at nógvu og trúgvu áskoðararnir fara at møta upp.

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 17 | 9 | 4 | 4 | 46 | 31 | 15 | 31 |
| 2 | Skála | 17 | 8 | 6 | 3 | 29 | 18 | 11 | 30 |
| 3 | ÍF | 17 | 9 | 2 | 6 | 50 | 29 | 21 | 29 |
| 4 | B36 | 17 | 9 | 2 | 6 | 37 | 36 | 1 | 29 |
| 5 | Sumba | 17 | 7 | 4 | 6 | 37 | 33 | 4 | 25 |
| 6 | NSÍ | 17 | 8 | 1 | 8 | 34 | 39 | -5 | 25 |
| 7 | HB | 17 | 6 | 3 | 8 | 30 | 34 | -4 | 21 |
| 8 | LÍF | 17 | 5 | 4 | 8 | 31 | 39 | -8 | 19 |
| 9 | KÍ | 17 | 4 | 4 | 9 | 24 | 35 | -11 | 16 |
| 10 | GÍ | 17 | 3 | 4 | 10 | 23 | 47 | -24 | 13 |